*Rætting:*

# Formula.fo ikki nógv dýrast kortini

SVEINUR TRÓNDARSON OG STEINBJØRN Í DALI

Í grein í K@T@-horninum hósdagin, stóð at lesa ein prískanning av teldukoyrikortum.

Her var niðurstøðan, at tað var nógv dýrast pr. tíma, at taka koyrikortið hjá Formula.fo.

Hetta er ikki rætt, og tí biðja vit Formula.fo um eina treytaleysa umbering.

Kostnaðurin fyri eitt teldukoyrikort frá Formula.fo er júst tann sami, sum hann er hjá Farodane (Kvasir), nevniliga 146,20 fyri hvønn tíma.

Orsøkin til mistakið er, at vit í útrokning okkara hava brúkt ov fáar tímar. Í útrokningini av tímakostnaðinum hjá Formula.fo brúktu vit 76 tímar, men rætta talið er 92.

Tá samlaði prísurin í báðum støðum er tann sami og tímatalið tað sama, so sigur tað seg sjálvt, at eindarprísurin fyri hvønn tíma eisini má vera tann sami.

Tí biðja vit Fromula.fo enn einaferð um eina treytaleysa umbering og vit kunnu við tí staðfesta, at Formula.fo tí kortini ikki hevur nógv dýrastu teldukoyrikortini.

| Undirvísingarstað | Samlaður prísur íroknað royndr | Umroynd | Skeiðtímar tilsamans | Prísur pr. tíma |
|---|---|---|---|---|
| Farodane (Kvasir) | 13.450,00 | 150,00 | 92 | 146,20 |
| **Formula.fo** | **13.450,00** | **150,00** | ***92*** | ***146,20*** |
| Handilsskúlin | 12.450,00 | 150,00 | 92 | 135,33 |
| Tekniski Skúli, Klaksvík | 11.300,00 | | 92 | 122,83 |
| VIT Sp/F | 11.900,00 | 325,00 | 88 | 135,23 |

***Soleiðis eigur talvan at síggja út:* Prísir á teldukoyrikorti.** *Allar upplýsingar eru heintaðir á Internetinum. Við í prísinum allastaðni er umframt sjálva undirvísingina, frálærutilfar, ábit og kaffi.*

# Norðoya Sparikassi nýggjan stjóra

33 ára gamli Eyðfinn Reyðberg skal nú í heita stólin í Norðoya Sparikassa.

1. mai tekur hann við sum stjóri eftir Jóannes Poulsen, sum ynskti at fara frá.

Eyðfinn Reyðberg hevur starvast í Norðoya Sparikassa í 12 ár, og seinastu trý árini hevur hann verið í Danmark tikið HD í greinunum fígging, fyrisiting og leiðslu.

Nýggi og fráfarandi stjórin fara at arbeiða saman næstu vikurnar.

**ek**

# Tiltak á Vaglinum sunnudagin

Undir heitinum »Vit vilja aftur í skúla« verður skipað fyri tiltaki á Vaglinum í Havn í morgin.

Byrjað verður klokkan 16.00, og skráin er hendan:

Vælkomin.

Tónleikur.

Nevndarumboð frá Lærarafelagnum heldur røðu.

Felagssangur.

Næmingaumboð heldur røðu.

Tónleikur.

Umboð fyri skúlaleiðslurnar heldur røðu.

Tónleikur.

Felagssangur

Tað er samskipanarbólkurin hjá Føroya Lærarafelag, sum skipar fyri tiltakinum.

# Landsstýrið samt við Nyrup

*Landsstýrið heldur røðuna hjá danska forsætisráðharranum á fólkatingi hósdagin benda á virðiligari samráðingar enn seinast. Eisini er landsstýrið samt í nógvum av innihaldinum*

JOHN JOHANNESSEN

Føroya Landsstýri tekur undir við sjey av nýggju brotum í røðuni, danski forsætisráðharrin helt undir orðaskiftinum á fólkatingi hósdagin um ríkisrættarligu støðu Føroya.

Hetta sæst í skrivligum viðmerkingum, landsstýrið hevur sent fjølmiðlunum eftir orðaskiftið.

Landsstýrið heldur frágreiðingina og orðaskiftið sum heild vera tekin um, at teir komandi fundirnir millum landsstýrið og stjórnina fara at verða virðiligari, enn fundurin tann  17. mars.

Fyrsta brotið í røðuni, landsstýrið tekur undir við, er at Nyrup vísir á, at Føroya fólk skal taka eina avgerð, eitt val, sum í veruleikanum bert kann og skal takast í Føroyum.

Landsstýrið heldur, at forsætisráðharrin við hesum virðir tey fólkarættarliga tryggjaðu rættindini hjá føroysku tjóðini at taka avgerð um egna lagnu. Tí sigur landsstýrið seg fegnast um hesi orð.

**Samstarva í veruligum felagsskapi**

Danskir forsætisráðharrin segði seinni í røðuni, at tað, ið bindur danir og føroyingar saman, eru tey sterku mentanarligu bondini, somuleiðis sum felags søguligu bondini.

Hesum tekur landsstýrið fult undir við og vísir á, at at tað ikki eru pengar og politiskt vald, ið knýta føroyingar og danir saman. Harafturímóti vísir landsstýrið á, at bondini, ið knýta, eru tey mentanarligu, søguligu bondini, eins og tey familjubondini.

Landsstýrið vísir á, at hetta júst er orsøkin til, at Landsstýrið vil koma burtur úr tí búskaparliga og politiska bundinskapinum, sum í so nógv ár hevur elvt til klandur og stríð millum tjóðirnar.

Hinvegin heldur landsstýrið, at tá bundinskapurin er burtur, kunnu tjóðirnar í einum veruligum felagsskapi samstarva um tað, sum knýtir tær saman, uttan at togast um valds- og peningaspurningar.

Danski forsætisráðharrin kom eisini inn á alheimsgerð í røðu síni, og vísti hann á, at heimurin er nógv broyttur seinastu tíggju árini. Alheimsgerðin er vorðin ein veruleiki, kappingin er vorðin harðari og altjóða búskapur hevur ræðið.

Eisini hesum orðum tók landsstýrið fult undir við. Landsstýrið vísir í tíðindaskrivinum á, at tað í øllum sínum fyrireikinum til fullveldisætlanina hevur tikið støði í, at altjóðagerðin er ein veruleiki. Hetta sigur landsstýrið vera eina av fremstu orsøkunum til, at Føroyar skulu hava fullveldi.

– Fullveldi er atgongumerkið, sum gevur atgongd til luttøku í altjóða samstarvi og altjóa felagsskapum. Tað er bert um Føroyar ikki fáa fullveldi, at altjóðagerðin verður ein trupulleiki, sigur landsstýrið í tíðindaskrivinum

Grundgevingar landsstýrisins fyri hesum eru, at Føroyar ikki kunnu luttaka í altjóða samstarvi á stjórnarstigi so leingi Føroyar eru undir donskum valdi. Avleiðingin av hesum, heldur landsstýrið kann vera, at Føroyar verða avbyrgdar, og verður hetta til stóran bága fyri føroyskan búskap í framtíðini.

**Blokkstuðulin skal burtur**

Seinni í røðu síni vísti Poul Nyrup Rasmussen á, at fáa Føroyar fullveldi, merkir hetta fulla politiska ábyrgd - eisini á fíggjarliga økinum.

Hesa útsøgn fegnast landsstýrið um.

Tó fegnast landsstýrið ikki so nógv um, at Poul Nyrup Rasmussen stendur fast við eina skiftistíð á trý til fýra ár. Men landsstýrið er kortini samt við forsætisráðharranum í, at blokkstuðulin skal burtur. Landsstýrið metir útsøgnina hjá forsætisráðharranum sum eitt samráðingarútspæl.

Nyrup vísti á, at heldur ríkisveitingin til Føroya fram, eftir at føroyingar hava fingið fullveldi, fer hatta at gera, at vit reka ein ábyrgdarleysan búskaparpolitikk.

Eisini hesum tekur landsstýrið fult undir við.

Næst seinasta brotið í røðu forsætisráðharrans, ið landsstýrið fegnast um, var tá hann segði, at eingin ivi skal vera um, at luttøka føroyinga í danska samfelagnum er virðismikil. Hetta metti landsstýrið sum eina umbering fyri roknistykkið, stjórnin legði fram á fundinum 17. mars.

Poul Nyrup Rasmussen segði eisini, at stjórnin konstruktivt fer at arbeiða fyri at finna samráðingarloysnir í fullveldismálinum. Hetta metir landsstýrið sum eitt tekin um, at tað, sum hendi á fundinum 17. mars ikki fer at endurtaka seg.

Landsstýrið tekur ikki undir við Nyrup, tá hann sigur, at ríkisfelagsskapurin skal metast sum ein felagsskapur millum tveir javnbjóðis partar. Hetta heldur landsstýrið bert ber til uttan fyri ríkisfelagsskapin.

HUGNAKVØLD

-serliga ætlað eldri fólki

Hóskvøldið 13/4

Til Matna

❊ Fesk súpan

❊ Lambasteik

❊ Kaffi/te og íslagkøka

JANUS PETERSEN sigur frá,

EIVØR PÁLSDÓTTIR syngur

og eisini verður felagssangur og klavertónleikur

Øll eru vælkomin, bæði bólkar og einstaklingar


Janus Petersen


Eivør Pálsdóttir

Kostnaður fyri tiltakið kr. 150,-

Tilmelding á tel. 31 75 00

Altíð vælkomin á

Eisini fæst bílig gisting

Hotel Föroyar

Tel. 317500

Best Western



3 ferðir um vikuna til Íslands:



MÁNADAG

MIKUDAG

FRÍGGJADAG

Ofta er ein noyddur at skræða eina heila viku úr kalendaranum fyri at fara til Íslands. Tað nýtist tær ikki longur. Tí nú verður flogið 3 ferðir um vikuna til Íslands, og so er gamaní at seta ferðina saman soleiðis, at sleppast kann aftur og fram tá tað hóskar tær best.

**Til Íslands í handilsørindum:**
Flúgv til Íslands mánadag kl. 17.30 og kom aftur mikudag kl. 11.30, ella fríggjadag kl. 18.30

**Vikuskiftistúr í Reykjavík:**
Flúgv til Íslands fríggjadag kl. 17.30 og kom aftur mánadag kl. 18.30



Vit hava nógv góð tilboð til Íslands í ferðafaldara okkara "Út í heim"

Atlantic Airways

Tel 333 900 · www.atlanticairways.fo